

# Prísurin á olju heldur fram at lækka

**Jógvan Hugo Gardar**

06.01.2015 - 09:28

Oljan.fo

Mánamorgunin var oljuprísurin tann lægsti hann hevur verið seinastu seks árini. Klokkan 08.45 mánamorgunin kostaði eitt fat av norðsjóvaroljuni Brent 55,35 dollarar. Amerikanska lættoljan kostaði tá 51,73 dollarar fyri fatið.

Sambært tíðindastovuni Reuters er orsøkin til at oljuprísurin heldur fram við at lækka í tí nýggja árinum at tekin eru um at búskapurin í evruøkinum framvegis ikki vísir tekin um at batna.

Tá prísurin á Brent-oljuni var hægstur í 2014 lá hann á 115,62 dollarar fyri fatið.